

## B36 vann í Streymnesi

B36 og EB/Streymur spældu leygardagin seinna venjingardystin ímóti hvørjum øðrum innanfyri eina viku. Dystin í Havn vann EB/Streymur 2-1, og leygardagin var tað B36, sum átti tørn at vinna. Úrslitið av dystinum gjørdist 2-0 til B36. Allan Mørkøre, sum nú aftur skal royna seg við B36, skoraði annað málið, og hitt málið var eitt sjálvmál frá Knút Vesturtún. Annars er vert at nevna at dysturin varð spældur í Streymnesi, har EB/Steymur fer at spæla sínar heimadystir í ár.

## Jon Dahl skoraði

Danski álopsspælarin Jon Dahl Tomasson skifti fyri góðari viku til spanska felagið Villareal at spæla, og í sínum næsta dysti fyri felagið skoraði hann. Villareal spældi í leygardagin á útivølli ímóti Recreativo Huelva, og liðið tapti dystin 2-1. Málið hjá Villareal skoraði Jon Dahl Tomasson, eftir at hann varð sendur á vøllin í seinna hálvleiki.

Neistin-H71 27-26 (14-17):

# Fyrsti Neista-sigur í ár

**Ikki síðani november mánað hevði manslíðið hjá Neistanum vunnið í landskappingini, og tí var fagnaðurin skilligur, tá Roar Dalsgarð smekkaði avgerandi bóltin inn við seinasta skotinum í dystinum**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tóktist vera ein djørv avgerð, sum Neista-venjarin, Claus Rasmussen tók, tá gott korter var farið av dystinum móti H71 sunnudagin. Talvan vísti tá 7-13, og tað var millum lítið og einki, sum bendi á, at Neistin skuldi vera ávegis einum tiltrongdum sigri í Atlantic Airways-kappingini.




*Ári Dam stóð ein branddyst, tá hann varð sendir á vøllin eftir eitt korter. Og fyrst og fremst var tað honum at takka, at Neistin fyri fyrstu ferð í tveir mánaðir fór av vøllinum við tveimum stigum*

*Mynd: Álvur*

### Djarvar skiftingar

Tað var eyðsæð, at fleiri av spælarunum hjá Neistanum ikki leveraðu tað, sum venjarin ynskti, og tí vóru skiftingar kanska væntandi. Men tað var neyvan væntandi, at skiftingarnar skuldu verða somikið stórar.

Blagoej Buha, Áki Mørk og Jacob Larsen munnu allir teljast millum týdningarmestu spælararnir hjá Neistanum, men teir vórðu allir tríggir koyrdir á beinkin, og tað var bara Áki, sum yvir høvur slapp í dyst aftur.

### Framúr málverjaspæl

Og so byrjaði dysturin spakuliga at venda. Serstakliga var Ári Dam í fokus, tá hann við stórspæli pilkaði eina rúgvu av skotroyndum frá H71 niður. Nakað sum eisini var neyðugt, tí verjuspælið hjá teimum bláu var sjáldan tað heilt stóra at rópra hurra fyri.

Og stórspælið hjá Ára bara helt fram eftir steðgin. Fyrsta korterið av seinna hálvleiki skoraði H71 bara tvær ferðir, og so var tað brádliga Neistin, sum var á odda.

Teir tóktust nú eisini móti tryggum sigri, men seinastu løtuna koppaði aftur. Hoyvíkingar fingu brádliga aftur glið á, og teir vunnu seg eisini upp á javnt.

Men Neistin átti tó seinasta orðið. Í seinasta álopinum fingu teir fríkast. Tvey sekund vóru eftir, og hetta var nóg mikið hjá Roar Dalsgarð. Hóast hoyvíkingar settu múr upp, so leyp hesin ikki eins høgt og Roar, og tá Levi Nybo heldur ikki megnaði at taka skotið, fór Neistin avstað við sigrinum.

### Møguleiki fyri finaluni

At fagnaðurin var stórur á teimum bláu, var ikki løgið. Ikki síðani 29. november hevur liðið vunnið í landskappingini, og tað hevur havt við sær, at liðið er dragnað nakað nógv í oddastríðnum.

Men trý stig í teimum báðum seinastu dystunum saman við vánaligu gongdini hjá StÍF hava nú havt við sær, at liðið veruliga er um fáa fatur aftur. Á talvuni eru nú bara tvey stig upp til ein finalusess, og tó at spælið enn kann betrast heilt nógv, so fær hetta illa verið annað enn hugaligt hjá liðnum.

Hoyvíkingar eru hinvegin einasta liðið, sum mest sum einki hevur at spæla fyri longur. Dysturin móti Neistanum var helst seinasta útkall í so máta, men við fimm stigum upp til næst ovasta sessin er er helst púrasta vónleyst at ímynda sær teir sum veruligar avbjóðarar. Og spælið hesa ferð borgaði sum so heldur ikki fyri eini slíkari støðu.

## FAKTA

**Neistin-H71 27-26 (14-17)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Roar Dalsgarð 5, Tróndur Kragesteen 5(1), Dann Thorleifsson 4, Jugoslav Djumic 4, Blagoje Buha 2(1), Carl Herup Olsen 2, Áki Mørk 2, Jóhan Brekkstein 2, Helgi Michelsen 1, Karl Oddmar Rasmussen 1
**H71:** Niels Viggo Niclasen 7, Esbern Patursson 5(1), Tróndur Vatnhamar 5, Poul Kjartan Dam 4, Bjarni Sørensen 4, Janus Sørensen 1
**Brotskøst:** Neistin 3, H71 2
**Útvísingar:** Neistin 2, H71 3
**Dómarar:** Hannis Wardum & Uni Wardum

## Sjálvsálitið alt at siga

Roar Dalsgarð var maðurin, sum við seinasta skotinum í dystinum vissaði Neistanum sigurin í sunnudagin. Og sjálvur helt Roar, at talan var um ein ómetaliga týdingarmiklan av slagnum.

– Fyri sjálvsálitið hevði hetta alt at siga. Vit skuldu havt vunnið í Vestmanna seinasta vikuskifti, men veruleikin er samstundis, at vit fingu eitt lyft, tá vit vunnu seinnu hálvfinaluna móti StÍF.

Síðani tá hevur Neistin ikki tapt, og við bara tveimum stigum upp til annaðplássið, er tað enn ein púra opin spurningur, hvørt teir hava møguleikan at spæla seg í FM-finaluna.

– Tað er so tað, sum vit fara eftir. Vit eru væl við, og so mugu vit bara ikki snáva nú seinastu dystirnar. Men tað er so eisini galdandi fyri hini liðini í oddinum, so eg rokni við, at talan verður um nakrar sera spennandi dystir nú seinastu umførini.

Um málið, sum Roar skeyt móti dystarenda, segði hann, at har var ikki so nógv annað at gera enn at royna.

– Tíðin er jú ikki til so nógv. Eg royndi bara at koma upp um múrin, áðrenn skotið varð sent avstað. Tað eydnaðist, og hóast Levi í H71-málinum helt, at talan var um nóg so heppið mál, so er tann spurningurin ikki so týðandi fyri okkum.

**-mørk**

# Graslíki á Tórsvøll

**Fleiri venjingar og størri heimavøllarfyrimunur eru málið, nú FSF heitir á Tórsvøll um at skifta grasið um við graslíki**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum so er talan ikki um nýggja ætlan. Í fleiri ár hevur verið arbeitt við at fáa altjóða góðkenning til graslíkisvøllir, og altjóða fótbóltssamgongurnar hava mest sum boðað frá, at graslíki verður góðkent til altjóða dystir um heilt stutta tíð.

Samstundis hevur leiðslan fyri Tórsvøll umhugsað, at teirra vøllur eisini skal hava nýtt undirlag.

– Vit hava ikki vilja gjørt nakað, fyrr enn FSF hevur boðað frá, hvørt hetta er í samsvari við teirra ætlanir, sigur Poul Michelsen, formaður fyri grunnin.

Nú hevur Fótbóltssambandið sent grunninum áheitan, har mælt verður til, at graslíki verður lagt á vøllin. Bæði tí hetta er lættari at halda, og tí hetta gevur møguleika fyri munandi fleiri venjingum.

– Vit hava síðani verið í samband við Tórshavnar kommunu. Eisini tí vit meta, at hetta kann bøta nógv um støðuna hjá havnarfeløgunum, sum hava eitt alt ov stórt trýst á venjingartímum, sigur Poul Michelsen.

Enn er ikki tosað um, hvussu íløgan skal fíggjast, men sambært formanninum verður hendan einar 3-3 mió kr. til støddar.

Í brævinum, sum Fótbóltssambandi hevur sent grunninum fyri Tórsvøll, verður víst á nakrar fyrimunir, sum kunnu standast av, at graslíki verður lagt á Tórsvølli.

Serliga eru tað trý viðurskifti, sum FSF leggur stóran dent á. Venjingarnar hjá landsliðnum kunnu verð væl meira regluligar, samlaða støðið á landsliðsleikarum og landsliðnum hevði hækkað, og so vildi ein slíkur vøllur eisini givið føroyska liðnum størri fyrimun av heimadyst, heldur altso FSF.